# Stjóri leggur frá sær



**Jákup Dahl-Olsen, stjóri hjá Pf. Leif Mohr, leggur frá sær 1. februar eftir 33 ár í starvi**

TÍÐINDASKRIV

Jákup byrjaði hjá Pf. Leif Mohr 1. februar 1970. Eftir at stovnarin av fyritøkuni, Leif Mohr, doyði í desember 1978, varð Jákup settur tekniskur stjóri frá 1. januar 1979.

Jákup hevur seinastu 33 árini tikið lut í stórum pørtum av menningini av føroyska vinnulívinum og føroyska samfelagnum sum heild. Hetta bæði sum projekterandi og har Pf. Leif Mohr gjørdi el-arbeiði ella køli-arbeiði.

Flestu havnaútbyggingunum kring landið var Pf. Leif Mohr við í , eins og í teimum mongu flakavirkjum, ið bygd vóru um alt landið. Heilt frá Frostvirkinum í Norðdepli til Polarfrost í Vági.

Stórar byggingar eru eisini farnar fram hesi árini. Og gjøgnum sítt virkið hjá Pf. Leif Mohr hevur Jákup verið við í byggingini av til dømis Vesturkirkjuni í Havn, Norðurlandahúsinum og Hotel Føroyum.

Jákup hevur røkt álitisstørv fyri Havnar Handverksmeistarafelag. Fyrst sum tiltakslimur frá 1981-1993 og seinni sum nevndarlimur frá 1993-1999.

Eitt skifti var Jákup formaður í Føroya Verkfrøðingafelag, og eisini er Jákup føroyskt umboð í nevndini fyri Nordisk Vej Teknisk Forbund.

Nú Jákup fer frá, verður skipað fyri móttøku í hølunum hjá Pf. Leif Mohr á Hoyvíksvegi 53, fríggjadagin 31. januar millum kl. 16 og 18.

PF LEIF MOHR

Móttøka

Í sambandi við at stjóri okkara

Jákup Dahl-Olsen

hevur avgjørt at leggja frá sær
1.februar á sínum 33 ára starvsdegi,
verður skipað fyri
móttøku í hølunum hjá Pf. Leif Mohr
á Hoyvíksvegi 53, fríggjadagin 31.
januar millum kl 16 og 18.

pf Leif Mohr Hoyvíksvegur 53 Postboks 3100 FO-110 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo

# Hans Jacob Debes farin



Tað boðaði óráð, tá merkið varð vundið í hálva stong í Tórfinsgøtu sunnudagin. Hans Jacob Debes, professari og rithøvudur, var farin, 62 ára gamal.

Hans Jacob Debes var gáarmaður, føddur 17. juli í 1940. Hann var sonur Olivar og Hansinu Debes, sum bæði vóru frá Gjógv. Tey vóru ein stórur barnaflokkur, 13 í tali, har Hans Jacob var elstur av dreingjunum.

Barnaárini gekk Hans Jacob í skúla við Gjógv, og hann hevur mangan greitt frá, hvussu góður skúlin var, og hvussu vitugur lærarin, Hans Kristiansen, var. Har fekk hann gott í beinið at bera víðari, segði hann. Men áðrenn hann fór víðari í skúla, fór hann til skips við slupp á suðurlandinum og við íslendskum trolara árini 1955-57. Hann fór á preliminerskúla í Havn í 1957 og tók prógv í 1959 – og nýmálsligt studentsprógv í 1962.

Hans Jacob leitaði sær til Danmarkar, har hann las søgu og enskt mál og bókmentir. Í 1970 tók hann prógv sum cand. mag.

Heimkomin til Føroya í 1971 fór hann í starv sum lærarari á Studentaskúlanum í Hoydølum, har hann undirvísti í søgu, enskum, fornaldarfrøði og samfelagslæru, eins og hann í nógv ár var tímalærari á Føroya Læraraskúla. Hann var giftur við Elsu, fødd Arge, og tey áttu børnini Per, Elin og Súsonnu, tá tey fluttu út í Tórfinsgøtu at búgva tíðliga í sjeytiárunum. Seinni kom so Ólavur afturat barnaflokkinum.

Heimið hjá Hans Jacobi og Elsu í Tórfinsgøtu var eitt opið heim, har børn altíð savnaðust – eitt fløtt heim, har børnini kendu seg væl.

Hans Jacob hevur eisini verið ein virkin rithøvundur, og kom fyrsta bókmentaverk hansara út í 1984. Tað var søgubókin »Nú er tann stundin«, sum hann hevði arbeitt við líka síðani lestrarárini. Hetta var eisini doktararitgerð hansara – og gjørdist hann dr. phil við Hóskóla Íslands. Seinni komu fleiri søgubøkur úr hansara hondum, bæði um politiska søgu í Føroyum og í Íslandi. Í 1986 fekk Hans Jacob Debes M. A. Jacobsensvirðisløn fyri yrkisbókmentir.

Í 1989 var hann tilnevndur professari í almennari søgu og Føroya søgu á Fróðskaparsetri Føroya. 1987-1990 prorektor. Hann var deildarleiðari á Søguvísindadeildini. Frá 1995 megindeildarleiðari (dekanur) á Søgu- og samfelagsdeildini.

Hans Jacob Debes var virkin í politikki. Hann var tjóðveldismaður og sosialistur. Hann hevði mong álitisstørv í Tjóðveldisflokkinum, og tá Ellintur Patursson doyði í 1986, tók hann sæti á tingi – og var tingmaður til 1988. Av álitisstørvum annars kunnu nevnast, at hann var formaður í nevndini, sum fyrireikaði yvirtøkuna av føroyska skúlaverkinum frá ríkinum til heimastýrið 1978. Hann var í stjórnini fyri Føroya Fólkaháskula (1973-90), í stýrinum fyri Norðurlandahúsið (1988-92), í Føroya Skúlastjórn (1975-78), í Landsskúlaráðnum (1988-92, formaður í stýrinum fyri Húsalánsgrunnin (1975-79 og 1989-91).

Seinnu árini hevur Hans Jacob havt ringa heilsu, og nú var hann mettur av døgum, hann orkaði ikki meira.

Friður veri við minninum um Hans Jacob Debes.

**Eirikur**





*Byggingin av tveimum teimum fyrstu húsunum undir Grashjalla í Klaksvík er komin væl áleiðis. Øll 24 grundstykkini í fyrsta útbjóðingarumfarinum eru seld*

# Tá roðin um Nestindar fer...

**Byggingin av tveimum teimum fyrstu húsunum við nýggja íbúðarvegin, undir Grashjalla, í Klaksvík er farin í gongd. Annað húsið verður reist fyrsta dagin**

BYGGING
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Í hesum døgum er nógv virksemi við nýggja íbúðarvegin undir Grashjalla í Klaksvík. Tað fyrsta húsið verður reist fyrsta dagin, og eitt annað er eisini komið væl ávegis.

Tað er væl skilligt, at nógv ynskja at búgva við nýggja íbúðarvegin. Útsýnið er einastandandi gott og nakað heilt serligt. Ein sær yvir allan býin og yvir á Syðradal og Húsar á Kalsoynni.

Serliga tá sólin setur kann tað verða avbera flott at síggja yvir á Nestindarnar á Kalsoynni. Tað hoyrist millum annað aftur í Klaksvíkssanginum, har Bernhard Brim yrkir: » ...tá ið roðin um Nestindar fer, og hvørt fjall eins og reyðarfjall skínur, ert tú paradís mítt her í verð«. Og líka so flott kann sama útsýnið verða ein vakran vetrardag.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sigur, at bíðilistin eftir grundstykkjum í býnum er sera langur, og um hugsað verður um, at øll 24 grundstykkini undir Grashjalla vórðu seld eftir stuttari tíð, so kann annað ikki sigast enn, at eftirspurningurin eftir grundstykkjum er sera stórur.

Útstykkingin undir Grashjalla er tó ikki liðug enn. Borgarstjórin sigur, at 14 grundstykki afturat verða útboðin í nærmastu framtíð. Hann sigur, at aðrar ætlanir eru í býnum, sum kunnu loysa bústaðartrupulleikan. Millum annað er ein alternativ útbjóðing av eini privatari íbúðarverkætlan í umbúnað, og kommunan er í samráðingum við ein av útbjóðarunum.

Steinbjørn Jacobsen leggur afturat, at tað eru eini 80 ella 90 privat grundstykkir í býnum, sum kommunan ikki bara soleiðis uttan víðari kann fáa hendur á. Grundstykkini undir Grashjalla eru millum 400 og 500 fermetrar til støddar og kosta byggibúgvin millum 180.000 og 200.000 krónur.

